

*Millum teir gomlu havnarmenninar, sum Johan kendi vóru Poli skómakarin tv., sum búði í Konradsbrekku og Berint á Árnafirði, sum búði í Bøgøtu. Poli hevur beint verið í Vágsbotni og keypt fisk til døgurða*

munni til annan.

Tað var stuttligt hjá einum smádreingi at lurta. Tað vóru nakrir fáir, sum høvdu radio, og hesir kundu bera tey tíðindi, teir hoyrdu, fram á heilt ymiskan hátt.

## Mistu húsini

Fyrstu árini búðu vit í Horni heima hjá ommu og abba. Men pápi bygdi uppi í Tvørgøtu. Men hann kom til skaða umborð á einum enskum trolara og misti inntøku í eitt heilt ár. Úrslitið av hesum var, at vit mistu húsini.

Tá bleiv pápi eitt sindur trútin, og hann segði, at hann skuldi ikki aftur koma í eina slíka støðu, at hann skuldi skylda nakað. Tað gjørdi hann heldur ikki.

Tá fóru vit at leiga ymsa staðni í býnum. Millum annað leigaðu vit uppi hjá Skælingseinkjuni upp við gomlu brandstøðina í Tróndargøtu. Haðani fóru vit til Bil Óla, har Mimir er í dag. Vit búðu eitt ár uppi á loftinum og eitt ár í neðra. Harfrá fóru vit til Herthu Niclassen. Leigan var 20 kr. um mánaðin. Men tað var ikki lætt. Tað var einki arbeiði og harvið ongir pengar. So fóru vit niðan á Tinghúsvegin, og har vóru vit undir øllum krígnum. At leiga var sera strævið. Húsini skuldu ikki rørast. Tað bar ikki til so frægt sum at seta ein nagla í nakrastaðni. Tað var heldur ikki altíð, at húsini vóru í so góðum standi.

Tá vit bygdu herúti við Gráa-stein, átti pápi hesa trønna, sum hann fekk umleið 1936. Vit bygdu hús her og fluttu inn krossmessu-dag 3. mai í 1947. Við búðu saman alla tíðina, sum foreldrini livdu.

Pápi var so bangin fyri at koma í skuld, at tað vardi leingi, til vit fingu ravmagn. Tað var jú so øgiliga dýrt at brúka. Ein kilowatt-tími kostaði eina krónu ella tað sama sum eina tímaløn. Tá við so endiliga fingu elektrisitet, høvdu vit bert tvær perir, sum heldur ikki sluppu at lýsa óneyðugt.



*Tróndargøta fyrr*

## Í skúla

Eg byrjaði at ganga í skúla hjá frú Mohr við Landavegin. Hon hevði ein av teimum mongu privatskúlunum, sum vóru í Havn umframt kommunuskúlan. Her skuldi gjaldast eitt skúlagjald.

Anna Sofía Mohr var dóttir Ludda í Dali. Hon var gift við Jens Martin Mohr, sum var av Sandi. Hann doyði ungur.

Frú Mohr hevði nógvar næming-ar. Á onkrari næmingamynd síggj-ast um 50 næmingar. Hon hevði tvey hold av næmingum.

Petur Háberg, føddur 1914, gekk eisini í skúla hjá frú Mohr.

Hann greiðir frá hesi skúla-gongd í Hugbirtingum. Har vóru tríggjar borðlongdir, og hon sat við endan á miðlongdini.

Petur greiðir eisini frá, at ein av merkisdøgunum var, tá ið frú Mohr gjørdi av, at nú skuldu tey fara ein túr til Velbastaðar – til gongu sjálvandi. Til eina slíka ferð slapp hann at keypa eina fløsku av nýggjum sodavatni, sum Ydun seldi, »Tutti-frutti«. Tað var dagur í viku.

Anna Sofía Mohr hevði privat-skúla frá 1921 til 1943. Hon doyði 7. apríl 1952 og er jarðað undir liðuni á manninum í gamla kirkjugarði í Havn.

Har gekk eg eitt ár. Tá brúktu vit griffil og talvu. Men ráðini vóru ikki til at halda áfram.

Síðan fór eg í kommunuskúlan á Vaglinum, har býráðshúsini eru nú. Her var Poul Jensen yvirlær-ari, Waagstein var sanglærari, Hanus Kamban hevði søgu, gamli Kjeld hevði okkum í føroyskum og Sámal Erik Matras hevði rokning. So var tað frú Bajer til gentufak, sum seyming og fimleik. Frk. Sivertsen hevði teir yngru flokk-arnar í skriving. Petur Snikk var sloydlærari. Hetta var ein stórur munar at koma frá einum skúla við bert einum lærari.

Við kommunuskúlan var eisini ein brandskúrur, har brandøvilsir vóru. Tá plagdu vit at vera við, og tá var tað stuttligt at fáa karm.

Eg var ongantíð í sætta klassa. Eg fór úr fimta uppí sjeynda klassa.

Eg tímdi so illa at ganga í skúla seinasta árið. Tá vóru vit bert tveir dreingir. Jógvan Johansen á Lag og eg.

## Terping var loysnin

Skúlaskapurin var fyri ein stóran part terping. Kundi tú endurgeva fyri lærarunum orðarætt tað, sum tú hevði havt fyri nakrar dagar frammanundan, so var sloppið.



*Konradsbrekka var ein høvuðsgøta tá í tíðini*



*Oman móti Lítluvík, har fleiri smiður vóru. Aftanfyri sæst Høgakai, sum var kolabrúgvin hjá Valdemar Lützen*

So tað ráddi um at hava eitt gott minni, og tað hevði eg eisini.

Tað var annars nakað lort at hava lopið ein klassa um. Tí tá ið kríggið kom, var eg púra sørur fyri søgu í Europa og Afrika, sum tað hevði verið hent at vita nakað um tá. Í fyrsta umfari vóru tað hesar heimspartar, kríggið snúi seg um.

Eg hevði lært um Amerika og Australia, sum var so nógv longri burtur. Danmarkarsøgu dugdi eg næstan uttanat.

Men eg vil siga, at tað var ein góður skúli, og lærararnir gjørdu nokk so nógv við tað.

Poul Jensen var ein so øgiligur sambandsmaður, og tað var danskt, eingin ivi um tað. Danskt lærdu vit eisini væl, og hetta kom til góðar, tá ið eg seinni fór á maskinskúla.

Men her var disiplin. Tann lús-ingin, man fekk frá Poul Jensen, hann gloymdi mann ikki. Tað var fult drøn á kassan.

Tá skipini komu aftur av Suður-landinum, og fiskaabeiðið byrjaði tað árið eg vildi verið 14 ár, stakk eg av úr skúlanum. Eg fór at arbeiða fisk Uppi á Nabb hjá Heinesen. Teir komu eftir mær og mestsum meldaðu meg, tí eg ikki gekk í skúla, men eg legði einki í tað. Tá ið tað var regn og ikki arbeiðandi, var eg kortini í skúla.

**Næstu ferð**

Næstu ferð fer Johan at arbeiða í Smæruni. Hann fer til skips fyrstu ferð, og hann fer at lossa á kaiini